## Vegleiðing í samband við abort

Eftir at tú hevur aborterað og fingið eina útskravan, er tað vanligt við løttum eymleika í undirlívinum og blóðugum útfloti í einar 10 dagar.

Í hesum tíðarskeiði er vandin fyri undirlívsbruna øktur. Tí eigur dentur at vera lagdur á reinføri. Um møguleiki er til tess, skola tær í neðra nakrar ferðir dagliga.

Ímeðan tú bløðir verður frárátt at:

- Brúka tamponir
- Fara í karbað
- Hava samlegu
- Svimja



Kalla lækna:

- Um tú bløðir sum menstruatión ella meir
- Um tú fært undirlívspínu
- Um tú fært fepur

Eggloysn kann koma um 14 dagar, so møguleiki at gerast við barn er til staðar longu áðrenn næstu menstruatión, sum annars kemur um uml. 1 mánað.

Vinarliga starvsfólkini á Skurðdeplinum

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo